## DAGSINS MEINING

# ST og Amnesty

Í morgin er altjóða ST dagur. Í ár nýtir altjóða felagsskapurin Amnesty International júst henda dagin til at seta ljóskastaran á brot á mannarættindi kring heimin. Í hesum sambandi er eisini føroyska deildin av felagsskapinum, sum ber orð fyri at vera sera virkin, við til at seta út í kortið av nýggjum. Føroyadeildin, sum hevur verið við í flestu stóru tiltøkunum mongu seinastu árini og hevur umboðað okkara lítlu tjóð á altjóða pallinum í stórt mát og væl, hevur sett sær fyri at fáa so nógvar føroyingar til ber at senda áheitanir til stjórnir í londum, har brot á mannarættindini eru gerandiskostur. Áheitanir um at steða hesum brotum.

Fríggjadagin 24. oktober fer felagsskapurin undir sína herferð, ið er eitt sera gott tiltak, sum vónandi nógvir føroyingar fara at taka undir við. Í lýsingum í bløðunum í morgin verður greitt frá, hvussu hvør einstakur føroyingar kann geva teimum, sum líða undir mannarættindabrotum kring heimin, eina hjálpandi hond.

Amnestyátakið ber heitið "Skriva fyri Lívi" og er endamálið at fáa føroyingar at arbeiða beinleiðis fyri at steðga mannarættindabrotum. Átakið varir í góðan mánað og endar sjálvan mannarættindadagin 10. desember. Ætlanin er at fáa fólk inn á heimasíðuna hjá Amnesty at tekna seg til at fáa brøv sendandi eina ferð um mánaðin at senda til stjórnarleiðarar og myndugleikar í londum, har brot verða framd móti fólki. Brøvini, sum verða send, snúgva seg um mannarættindabrot og –viðurskifti í londum kring allan heim.

Tað finst neyvan nakar betri dagur enn júst ST-dagurin at seta slíkt átak í gongd. ST er nevniliga tann stóri menniskjansligi og virðiligi karmurin um allar heimsins íbúgvar. Hesin ópolitiski felagsskapurin, sum skal umboða okkum øll og ikki minst børnini, tey sjúku og veiku, tey gomlu og rætt og slætt teg og meg, er helst eitt tað skilabesta tiltakið í mannasøguni. Amnesty-felagsskapurin hevur eina ikki minni týðandi uppgávu at røkja, hóast hann ikki fevnir so víða sum ST og er ein nógv øðrvísi felagsskapur. Men felags fyri báðar hesar felagsskapir er, at teir stríðast fyri friði og mannarættindum á eini jørð, sum er fyri okkum øll uttan mun til húðalit, trúgv og sosialan status annars.

Vit heilsa Amnesty í Føroyum og ynskja alt tað besta við hesum skilagóða átaki. Sum vónandi ber ávøkstur. Sum er við til at lata upp eygu okkara fyri tí órættvísi, sum fer fram so nógva aðrastaðni, samtíðis sum vónin er, at okkara íkast og áheitanir vera væl og rætt móttikin á rætta stað.

Og vit vilja fegin endurtaka her, at eitt hitt størsta brotið á mannarættindini í heiminum, verður framt av tí tjóð, sum so mong síggja upp til, USA. Við at tvíhalda um deyðadóm í ár 2003 má sigast, at hetta landið, sum kallar seg fyri "Guds own country", er størsti skammbletturin á heimskorti mannarættindabrotsins.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fosturtøka

**Reimund Langgaard**



Fosturtøka er eitt sera eldfimt evni, sum nógv hava sína greiðu meining um. Eg gangi fast á møti og trúgvi at Bíblian er Guds sanna orð, so lætt er at gita at eg eri ímóti fríari fosturtøku - eins og nógvir av mínum líkum. Tó hevur tað undrað meg nógv, at fosturtøka er blivið eitt stríð millum "fanatisk trúgvandi" og "restina".

Um fostrið er eitt menniskja, so burdu øll verið ímóti - aktiv sum minni aktiv kristin - og er fostrið ein slímklumpur, ja men so er einki at kjakast um. Tí so skuldi fosturtøka sjálvsagt verið loyvd. Ja tað skuldi verið ein rættur hjá einhvørji kvinnu.

Tískil er spurningurin í mínari verð, um fostrið er eitt menniskja ella um tað er ein slímklumpur. Ella sagt uppá ein annan máta, so er spurningurin nær barnið gerst menniskja - við giting ella føðing. Ella kanska tá ið tað er 12 vikur gamalt, hóast tað í mínari verð virkar púra ólogiskt.

Eg eri ikki serfrøðingur innan læknavísindi, og tí kanska ikki tann rætti at taka støðu til hvat eitt fostur er, men vil her endurgeva nøkur læknavísundalig fakta, sum kunna hjálpa til at fáa tikið hesa altavgerandi støðuna.

Hjartað hjá fostrinum byrjar at sláa, tá ið tað er millum 18-25 dagar gamalt (um 3 vikur).

Heilin hjá tí byrjar at virka, tá ið tað er um 40 dagar gamalt (um 6 vikur).

Tá fostrið er 12 vikur gamalt er tað 9cm langt. Hevur eygu, oyru, nøs, munn, armar, bein, fingrar og tær - ja tað hevur enntá fingið negl.

**Bjargar meira enn 3000 børnum**

Móður Teresa, sum flestu okkara helst høvdu sera stóra virðing fyri, brúkti nógva orku fyri at verja tey óføddu (børnini ella slímklumparnir). Hon segði eisini "if you do not want your unborn child, bring it to us and we will raise it" (um tú ikki ynskir títt ófødda barn, so gev okkum tað og vit vilja taka okkum av tí).

Hesi boðini hevur hon givið til nógv sjúkrahús, stovnar og fólk runt um allan heim, og hevur hennara hjálparfelagsskapur bjarga meir enn 3.000 børnum í Calcutta, India á henda hátt - umframt øll tey sum eru bjargaði í øllum hinum londinum, har hennara systrar eru virknar. Tey geva síðan hesi børnini víðari til familjur, har børnini eru ynskt. Tað týdningarmesta er at børnini fáa lívið - gávuna, sum flest okkara eru glað fyri og halda fast í, men harumframt eru tær eisini við til at breiða gleði í nógvar barnleysar familjur.

**Rætturin til lív**

Móður Teresa segði eisini: "Um fólk velja at hava samlegu, so skulu tey vita, at tað er ein møguleiki fyri at eitt barn verður fødd vegna hetta. Vaksin eru vaksin, tí at tey vita um møguleikan fyri avleiðingar av teirra handlingum. Tey kunna rokna út vinning og skaða og síðan handla eftir normum og reglum. Vaksin eru før fyri at taka hesa ábyrgdina, av tí at tey kunna halda eftir, stýra og útseta... Um eg veit at eitt flogfar fer at detta niður, so fari eg ikki umborð. Um eg veit at veturin verður kaldur, so keypi eg heit klæði, og um eg veit at vegurin er hálur, so koyri eg spakuliga. Í hesum førunum virkar tað so sjálvsagt. Men tá ið talan er um okkara kynslív, so føla vit fullkomna fríheit og ongin avmarking skal stríða ímóti fríheitini" (leystliga umsett).

Eg eri persónliga sannførdur um, at fostur eru menniskju frá tí tey eru gitin, og at eisini tey eiga rættin til lív. Eg takki Guði fyri, at hann skapti meg í móðurlívi, og mammu míni fyri, at hon ikki drap meg har, men gekk við mær í 9 mánaðir og síðan setti meg inn í heimin.

Eg vil enda við at endurgeva Kim Larsen, tá ið hann syngur: "Det er godt, at vi blev født før aborten den blev fri."

# Um felags framhaldsdeild í Tórshavnar kommunu

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Á býráðsfundinum í kvøld, hóskvøldið 23. oktober, fer undirritaða at seta Jan Christiansen, borgarstjóra, soljóðandi fyrispurning:

**»Hvussu skal framhaldsdeildin í fólkaskúlunum skipast í framtíðini í Tórshavnar kommunu? Nær verður uppskotið um felags framhaldsdeild viðgjørt í mentamálanevndini?«**

Í samband við at nýggjur 2-sporaður fólkaskúli skal byggjast í Hoyvíkshagan-um, verður sagt, at skúlin skal rúma 1.-9. flokk. Eisini er roknað við 1.-9. flokki í útbyggingini av skúlanum í Kollafirði.

Tann 11.03.2002 sendi undirritaða uppskot um felags framhaldsdeild fyri skúlarnar í kommununi til býráðið. Hetta uppskotið er ongantíð viðgjørt av mentamálanevndini. Undirritaða legði uppskotið fyri býráðið aftur tann 12.02. 2003. Tá bleiv málið uttan viðgerð beint aftur í mentamálanevndina. Staðfestast má, at málið er lagt til síðis uttan viðgerð. Tí vil eg fegin hava at vita, hvørjar ætlanir eru nú, og nær mítt uppskot verður viðgjørt í mentamálanevndini.

Frá skúlastýrisformanni havi eg fingið at vita, at á fundi har allir skúlastýrisformenninir eru við, hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu upplýst, at ongar ætlanir eru um felags framhaldsdeild, og at málið ikki kemur til viðgerðar í býráðnum aftur. Um hetta er rætt, so vil eg fegin hava at vita, hvar henda avgerðin er tikin og nær?

Á opnum býráðsfundi hevur formaðurin í mentamálanevndini upplýst, at arbeitt verður við at skipa skúlaøkið soleiðis, at 10. árið møguliga skal skipast sum felagsskúli fyri alla kommununa. Um tað verður arbeitt við hesum, hvat skal so verða av næmingunum sum í dag ganga í skúlum, har bert grunddeildir eru? Skulu teir næmingarnir flyta skúla tríggjar ferðir, frá grundskúla í ein annan skúla at ganga 8. og 9. árið og so aftur ein nýggjan skúla 10. árið? Er tað soleiðis tit ímynda tykkum skúlaskipanina í framtíðini? Ella er nøkur ætlan um at orða framtíðar skúlapolitikkin fyri kommununa?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Meira fæst burtur úr at skera hýsuna við hond

**Hýsuprísurin er sera lágur í løtuni. Smáa hýsan verður útflutt heil, tí tað loysir seg ikki at skera hana til flak. Bretar fáa meira burtur úr at skera hana við hond**

FISKAMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Smáa hýsan má skerast við hond, um nøkur líkinda úrtøka skal fáast burtur úr henni. Maskinurnar eru ov ódrúgvar*

Tað loysir seg ikki at skera smáu hýsuna til flak í Føroyum. Úrtøkan úr maskinskeringini verður ov lítil, og bretar fáa meira burtur úr at skera hana við hond. Tí verður hon seld heil av landinum, siga fólk í flakavinnuni.

Føroyingar hava ein trupulleika í løtuni, halda fólk í flakavinnuni. Hann er, at vit duga ikki nóg væl at skera flak við hond. Alt er skorið við maksinum í so nógv ár, at vit hava mestsum gloymt handverkið.

Hetta bøta vit nú fyri við hýsuprísinum, sum er í botni. Tað loysir seg ikki at skera smáu hýsuna, sum vit fáa væl av undir Føroyum, til flak við maskinum. Úrtøkan verður ov lítil til, at nakað av týdningi liggur eftir.

Bretar hinvegin, sum keypa hýsuna frá okkum, fáa hana heila og skera so við hond. Tað duga teir og hava nógv meira eftir, enn maskinurnar klára.

Tað letur seg gera, siga keldur í vinnuni, tí teir hava lægri tímaløn enn vit. Hinvegin fá teir so nógv bonus, at inntøkan kortini er rættiliga góð hjá teimum.

Munur er eisini í fleiri førum á virkjunum, sum arbeiða hýsuna í Føroyum og í Bretlandi.

Í Føroyum hava vit framkomin flakavirki. Í Bretlandi hinvegin er talan í fleiri førum um smáar kjallarafyritøkur, har nøkur fá fólk standa og skera fløk til Fish & Chips handlar í grannalagnum. Tað kann heldur ikki samanberast, siga keldur okkara í flakavinnuni.

Nógv hevur seinnu tíðina veri tosað um heila fiskin, sum fluttur verður av landinum. Hildið verður, at hann eigur at verða arbeiddur her, so virðisøkingin veðru liggjandi eftir hjá okkum.

Tað vísir seg í fleiri førum at vera flakavirkini, sum annar skuldu arbeitt hendan fiskin her heima, sum selja hann heilan uttanlands. Serliga er tað smáa hýsan, sum fer soleiðis. Fólk í flakavinnuni, sum Sosialurin hevur toað við, siga, a tað kemst alt av vánaligu úrtøkuni, sum fæst úr smáari maskinskornari hýsu.

At virkini so yvirhøvur keypa hana, kemst av, siga tey, at tey keypa alla veiðuna, sum hon er, frá útróðrarbátunum fyri at fáa tann stóra fiskin. Tað smáa fylgir so við. Tað skilja virkini so og selja heilt í Bretlandi, verður sagt.

# Nokk at gera á Kósini

**Tey er nokk at gera á flakavirkinum á Kósini. Tað er mest toskur og hýsa, tey hava. Toskurin verður allur saltaður**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Á Kósini verður arbeitt hvønn dag. Í løtuni er nógvur saltfiskur á virkinum, og tey arbeiða í tveimum vaktum. Nakað av fólkinum á flakavirkinum er farið at pakka saltfisk*

Á flakavirkinum Kósini í Klaksvík er nokk at gera. Arbeitt hevur verið regluliga alt ár, og útlitini eru ikki so galin í løtuni.

Tað er toskur og hýsa, tey arbeiða á Kósini, sigur Egil Johansen, innkeypari á vikinum. Hýsan verður fyri tað mesta skorin til flak. Tó verður tann smæsta hýsan send heil av landinum, sigur hann.

Toskurin verður allur saltaður. Bæði flaktur og sum flak. Í seinastuni hevur nógvur banktoskur verið á virkinum. Hann er komin frá línubátunum, og hann verður allur flaktur.

Saltfiskurin verður seldur til Spania, og hýsan fer á enska marknaðin.

Tað er sera trupult at selja hýsu í løtuni, tí trýstið á enska marknaðin er vorðið so stórt, sigur Egil Johansen. Fyrr var nakað væl selt til USA eisini, men tá dollarin var fyri ógvusligum falli í fjør, steðgaði tað mestum upp, og alt fer nú til Bretlands. Tí er prísurin eisini hareftir, sigur hann.

Egil Johansen letur at, at marknaðurin fyri frystan fisk er einki serligur í løtuni. Feskfiskamarknaðurin er heldur betri, metir hann.

Men á Kósini veður einki selt feskt. Hýsan verður fryst, og toskurin saltaður.

Nú nógvur saltfiskur hevur verið á virkinum, verður arbeitt í tveimum vaktum. Tey hava tí tikið nakað av fólkinumá flakavirkinum til at pakka saltfisk, sigur Egil Johansen.